Kyndil-KÍF 30-30 (15-13):

# Kollfirðingar mistu aftur



*Annað vikuskiftið á rað mistu kollfirðingar ein at síggja til tryggan sigur. Hesa ferð var tað Kyndil, sum fekk loyvi at vinna eina tvey mála leiðslu aftur í seinastu minuttunum*

**Annað vikuskifti á rað tveittu kollfirðingar ein at síggja til tryggan sigur burtur í evstu løtu, soleiðis at talan bert gjørdist um javnleik**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Ein partur av sálarfrøðini innan ítrótt snýr seg um hugtakið »at tora at vinna«. Við hesum verður meint við, at lið ella einstaklingar skulu duga at halda høvdið kalt, tá ein sigur er í nánd, soleiðis at tað vunna ikki verður tveitt burtur í evstu løtu.

Kanska skuldu kollfirðingar fingið sær okkurt skeið í júst hesum partinum av lærubókunum, tí tað tykist í øllum førum, sum kollfirðingarnir slettis ikki duga at vinna.

Sunnudagin høvdu teir fyri aðru ferð á rað somikið gott tak á mótstøðuni, at tá ein minuttur var eftir, mundi eingin ivast í, at sigurin var vísur, men enn einaferð megnaðu teir onkursvegna at tveita alt burtur.

### Javnur dystur

Dysturin móti Kyndli var annars ein av teimum, sum alla tíðina var spennandi. Mest sum alla tíðina var bert hitt eina málið á muni millum partarnar, og tó at Kyndil eitt lítið skifti kring steðgin royndi at toga seg frá, so var javnvágin skjótt funnin aftur.

Seinastu tíggju minuttirnar ella har á leið var tó líkt til, at kollfirðingarnir skuldu rýma undan. Tó at Kyndil royndi at ansa jugoslaviska stórskjúttanum hjá KÍF, Damir Oros, so helt hesin nærum einsamallur muninum á tveimum málum, og hóast kollfirðingar eina løtu máttu spæla við einum manni í undirtali, so megnaði Oros kortini at skora. Við hálvum øðrum minutti eftir skeyt hann enn einaferð kollfirðingarnar tvey mál framum, men tá dómararnir so løtu seinni góvu honum tveir fingrar, fór av álvara at standa á. Og so kundi Kyndil so við teimum báðum seinastu málunum í dystinum bjarga øðrum stiginum.

### Bronsan nærkast

Og tað er einki at siga til, um kollfiðringar onkursvegna kenna seg snýttar. Ikki tí. Teir hava bert sær sjálvum at takka fyri, men við jøvnu støðuni á talvuni høvdu nøkur fleiri stig fyri seinastu dystirnar komið væl við. Munurin upp til Neistan á triðja plássinum er tó ikki meira enn trý stig, og við komandi dystum móti H71 og Tjaldri er tí ikki óhugsandi, at KÍF fer at liggja væl fyri í bronsustríðnum, tá farast skal undir seinasta fjórðingin av kappingini.

Tað ger Kyndil sum so eisini. Og kanska meira týdningarmikið, so kunnu teir sjálvir gera av, hvussu støðan verður undan endaspurtinum. Verður talan um sigur í komandi dystinum móti Tjaldri, er alt lagt upp til, at teir við einum sigri í grannauppgerðirni kunnu leghgja seg á bronsuna, men tað krevur so eisini, at meira stabilitetur fæst inn í spælið.

### Dysturin í tølum

Kyndil-KÍF 30-30 (15-13)
Málskjúttar:
Kyndil: Hans Áki Dal-Christiansen 7(2), Jacob Jónsosn 6, Heini Bendtsen 5, Janus Einar Sørensen 3, Høgni Klein 3, Ken Zachariasen 1
KÍF: Damir Oros 12, Petur Martin Poulsen 5, Regin Petersen 5, Kristjan Madsen 3, Mirko Milinkovic 2, Rógvi Weihe 1, Finn Heri Johannesen 1
Brotskøst: Kyndil 5
Útvísingar: Kyndil 1, KÍUF 6
Dómarar úr Tjaldir: Kári Hansen & Trygvi Mortensen.

StÍF-Tjaldur 26-19 (13-10):

# Trygt hjá StÍF

**Strandingar tykjast nú vera um at fáa glið á spælið aftur, og sunnudagin varð talan um tryggan sigur á Tjaldri**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Á pappírinum átti eingin ivi at veri um, at StÍF hevði ein avgreiðsluspurning á skránni sunnudagin. Sjálvir hava strandingarnir í alt ár hildið til ovarliga á stigatalvuni, meðan Tjaldur hinvegin er botnliðið, men sannleikin er ikki altíð so einfaldur. Og so slettis ikki tá talan er um grannauppgerðir.

Hetta varð millum annað prógvað, tá Tjaldur vitjaði í grundspælinum, og vunnu ein fullkomuliga óvæntaðan sigur á strandingum, men hesa ferð gjørdist so ikki talan um nakra endurtøku.

Tað var nevnliga skjótt greitt, at strandingar helst fóru at gerast ov drúgvir. Mest sum alt fyri eitt løgdu teir sjógv ímillum partarnar, og so høvdu teir annars tamarhald á tí mesta av tí, sum gekk fyri seg. Einar tvær ferðir høvdu gestirnir hug at gerast heilt naskir, men hvørja ferð setti StÍF bara meira ferð á, og so gjørdist ikki meira.

### Gullformurin nærkast

Og sum skilst, so var spælið hjá strandingunum hesa ferð nakað væl betri, enn tað annars hevur verið í endaspælinum. Her hevur tað til tíðir verið kilometrar við síðuna av kvika og ágangandi kontrahondbóltinum, sum liðið meistraði í grundspælinum, og sum legði lunnar undir verandi støðuna.

Og tað er eisini í tøkum tíma, at strandingar nú finna rætta spælið framaftur. Komandi dysturin er ímóti Neistanum, sum enn heldur fast um triðja plássið, og gevur hesin fulla úrtøku, so stendur VÍF fyri framman í einum dysti, sum tykist kunna gerast ein av tveimum, ið avgera meistaraheitið.

Tjaldursmenn mugu hinvegin framvegis smyrja seg við, at teir eru niðastir á talvuni. Liðið hevur til tíðir sýnt spæl, sum átti at givið eina væl hægri støðu, men tað tykist í fleiri førum, sum um orkan gongur undan, soleiðis at stigini aloftast verða mist kortini.

### Dysturin í tølum

StÍF-Tjaldur 26-19 (13-10)
Málskjúttar:
StÍF: Sveinur Justinussen 9, Alexandur Johansen 6, Artur Johansen 4, Costin Dumitrescu 2, Bent Djurhuus 1, Jón Rasmussen 1, Kristjan Petursson 1
Tjaldur: Dragisa Stojovic 11(2), Sverri Justinussen 5(1), Zoran Sarcevic 2(1), Áki L. Hansen 1
Brotskøst: StÍF 1, Tjaldur 7
Útvísingar: StÍF 2, Tjaldur 3
Diskvalifikatión: Tjaldur 1 (beinleiðis reytt)
Dómarar úr Neistanum: Kristian Johansen & Sámal Hansen.



# Ongan blanco-kekk og tó

**Í broyttum uppskoti var undirtøka fyri uppskotinum frá nevndini, um at nevndarlimir kunnu fáa løn fyri arbeiði sítt, samtykt**

AÐALFUNDUR
*Jákup Mørk*




*Tó at uppskotið hjá nevndini varð broytt, áðrenn aðalfundurin vildi samtykkja tað, so kann væl hugsast, at broytingin ikki er so stór kortini*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Nevndin hjá Fótbóltssambandinum hevði lagt uppskot fram til samtyktar um samsýngin hjá nevndarlimum. Ein grein í reglunum hjá FSF hevur sagt, at nevndarlimir ikki fáa løn fyri arbeiði sítt, men hetta vildi nevndin hava strikað.

Orsøkin varð søgd at vera, at nevndarlimirnir í fleiri førum høvdu beinleiðis útreiðslur av skyldum sínum, og hetta hildu nevndarlimirnir vera órættvíst, segði Dánjal Andreasen, sum vegna nevndina førdi orðið í hesum spurninginum.

### Eingin blanco-kekkur

Tað tóktist tó vera púra greitt, at tað ikki var undirtøka millum feløgini at samtykkja uppskotið, soleiðis sum tað varð lagt fram av nevndini.

Í roynd og veru vildi talan eisini verið um mest sum ein blanco-kekk, um greinin bara varð strikað, tí tá hevði nevndin sjálvt havt heimild at áseta samsýning sína, uttan at feløgini høvdu nakað at siga hesum viðvíkjandi.

Tað mundi eisini falla mongum fyri brósti, at slíkt uppskot varð lagt fram, nú roknskapurin annað árið á rað sýndi stórt hall, men FSF-formaðurin legði tó eina við, at hetta ikki vóru nakrar munandi upphæddir, sum talan var um. Einar 14 dagslønir ella so helt hann, at talan mundi vera um. Og so legði hann eisini afturat, at hetta kortini vóru pengar, sum vórðu endurrindaðir av UEFA og FIFA, tí talan var ferðir, sum viðvíktu fundum hjá hesum.

Fleiri av feløgunum førdu fram, at um talan bert var um inntøkumiss, mátti orðignin í tekstinum broytast, soleiðis at hetta varð staðfest, og eftir hesa áheitan orðaði fundarstjórin nýtt uppskot til samtyktar, soleiðis at tað nú stendur, at nevndarlimir ikki fáa løn, men at teir kunnu fáa endurgoldið møguligan inntøkumiss, sum stendst av arbeiði teirra.

Heldur ikki hesa orðing vóru øll feløgini nøgd við. Summi teirra vildu hava, at tað í løgunum skuldi staðfestast, at hetta bert var galdandi, tá talan var um uppgávur fyri FSF uttanlanda, men hetta metti fundurstjórin ikki vera haldgóða orsøk at broyta uppskotið einaferð enn.

Endin varð, at uppskotið varð samtykt við 15 atkvøðum fyri og fýra ímóti, og soleiðis fekk nevndin sín vilja, tó at talan ikki gjørdist um blanco-kekkin, sum tað av fyrstan tíð líktist.

Men hóast hetta, so er orðingin í tekstinum helst meira liberal, enn andin í hesum, sum feløgini atkvøddu um. Sambært orðaskiftinum, so snúi hetta seg um endurgjald fyri tann lønarmiss, sum oftani stendst av teimum uttanlandsferðum, sum nevndarlimir skulu taka lut í. T.v.s. fundir hjá fyrst og fremst FIFA og UEFA.

Hinvegin stendur bara orðað, at nevndarlimir fáa endurgjald fyri inntøkumiss, og so er spurningurin, hvat hetta merkir. Eitt nú kann hugast, at tá nevndarfundur er eitt nú mikudag seinnapart, noyðast fleiri nevndarlimir at fara út arbeiði í úrtíð. Tá kunnu teir sambært lógini fáa endurgjald frá FSF fyri hesar tímar eisini.

At døma eftir orðaskiftinum, so er tó ikki stórvegis vandi fyri, at so er, men í ringasta føri kann hetta viðføra, at allir nevndarfundir so ella so kosta arbeiðstíð, og so er spurningurin, um blanco-kekkurin ikki kortini er latin nevndini.

Kyndil-Stjørnan 28-28 (18-12):

# Bronsan er framegis spennandi

**Kyndil hevði leingi leiðsluna, men eftir eitt langt hál eydnaðist kortini Stjørnuni at fáa annað stigið við sær heimaftur**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir Stjørnan hóskvøldið hevði mist oddin úr eygsjón, ráddi tað um at vinna nakað av sjálvsálitinum aftur, tá tær sunnudagin vitjaðu hjá Kyndli. Kyndil hevur hinvegin eisini havt sínar trupulleikar, og sum krúnan á hesum gjørdi venjarin hjá liðnum í farnu viku at siga seg sjálvan úr starvinum.

### Spenningurin heldur sær

Við nýggja venjaranum, Petur Martin Johansen, var leingi líkt til, at Kyndil skuldi vinna ein hart tiltrongdan sigur í bronsudystinum. Toluliga skjótt í fyrra hálvleiki kom eitt skott millum liðini, og sum hálvleikurin leið, tóktist Kyndil bara royna at økja um hetta.

Í steðginum var munurin komin upp á seks mál, og soleiðis skuldi ligið væl fyri hjá Kyndli at toga stigini heim, men Stjørnan vildi tað tó øðrvísi. Allan seinna hálvleik drógu teir eitt langt hál, og góðar fimm minuttir fyri leiklok vóru tær komnar upp á javnt.

Kyndil royndi at svara aftur, og tær lovaðu ongan tíð Stjørnuni framum, men hinvegin fingu tær heldur ikki togað seg leysar. Stjørnan svaraði hvørja ferð aftur, og endin var eisini, at tær fingu løn í form av einum einstøkum stigi.

Soleiðis er spenningurin um triðja plássið á stigatalvuni framvegis intaktur. Tað hevði hann sum so verið kortini, men enn er so eingin, sum hevur avgerandi fyrimun í tí stríðnum, og nú tykist StÍF eisini at koma aftanífrá í hesum.

### Dysturin í tølum

Kyndil-Stjørnan 28-28 (18-12)
Málskjúttar:
Kyndil: Lotte Sørensen 9 (7), Annika Ljósstein 6, Ileana Manolesco 5, Sonja Smiljic 3, Marjun Tróndarson 1, Heidi Maria Akselsen 1
Stjørnan: Danijela Ercevic 10 (3), Natasha Stamenkovic 7, Jastrid Gullaksen 4, Bára S. Klakstein 3, Joan M. Joensen 2, Una Olsen 1
Brotskøst: Kyndil 7, Stjørnan 4
Útvísingar: Kyndil 2, Stjørnan 7
Dómarar úr Tjaldur: Kári Hansen & Trygvi Mortensen.

VB-Tjaldur 32-17 (15-6):

# Full ferð móti FM

**Tjaldur megnaði als ikki at hótta VB, sum framvegis heldur beina kós móti FM-heitinum**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

VB er ovasta liðið í bestu kvinnudeildini, meðan Tjaldur er niðast. Veruleikin varð so dyggiliga stafðestur leygardagin, tá liðini avgreiddu útsetta dystin sínamillum.

Frá fyrsta bríksli kom munurin millum liðini til sjóndar, tá VB við fullari ferð royndi at renna Tjaldur um koll. Við útgangsstøði í sterkastu verjuni í landinum og so tveimum av bestu málskjúttunum staðfesti VB enn einaferð, at tær eru mest sum flúgvandi í løtuni.

Og Tjaldur kundi ikki gera annað enn at hyggja at, so hvørt sum munnurin øktist. VB sýndi ongan tíð tekin um at taka sær heilt av løttum, og tó at gestirnir sluppu betri upp í part í seinna hálvleiki, so styttist ongan tíð ímillum partarnar.

### Kós móti gullinum

Við stórsigrinum staðfestu VB-kvinnurnar enn einaferð, at tær nú hava kósina beint ímóti gullmerkjunum. Og sum liðið riggar í løtuni er ilt at síggja, hvør skal kunna gera nakað við hetta. Einasta møguliga forðingin tykist í løtuni vera útidystirnir ímóti Stjørnuni og VÍF, sum báðir skulu tapast, um VÍF skal kunna taka oddaliðið, men í løtuni tykist hetta mest vera ynskisdreymur hjá vestmenningunum.

VB hevur í øllum førum enn ikki sýnt veikleikatekin. Heldur er tað tvørturímóti so, at verjan gerst sterkari fyri hvønn dystin, sum gongur, og so er lag á manni at seta eyðkenda kontraspælið ígongd.

Tjaldur hevur hinvegin annað at hugsa um. Liðið er á aftasta sessinum í deildini, og fyri hvørt tapið minkar vónin um at halda sætið í deildini.Enn er vónin kanska ikki heilt slept, men tað er í øllum førum neyðugt, at stig verða fingin til høldar, um nakar sum helst spenningur skal koma í botnstríðið.

### Dysturin í tølum

VB-Tjaldur 32-17 (15-6)
Málskjúttar:
VB: Daiva Toumaite 9(4), Reda Kurkauskiene 6(1), Gurið Mortensen 5(1), Rannvá Augustinussen 3, Laila Jespersen 3, Arnelyg Hjelm 2, 2, Daiva Ylaite 1, Eyðbritt Krosslá 1, Eyðdis Kjærbo 1, Guðrun Midjord 1
Tjaldur: Lenka Ribaric 10(3), Milica Ergic 3, Ann Mari Østerø 1, Oddvá Fossdalsá 1, Heidi Heinesen 1, Mona Langgaard 1
Brotskøst: VB 7, Tjaldur 3
Útvísignar: Tjaldur 5
Dómarar úr TB: Kári Niclasen & Birgir Dimon.